## Meiri tosk og hýsu

Grønland og Noreg hava skrivað undir sáttmála sum sínamillum fiskirættindi næsta ár. Sáttmálin, sum varð undirskrivaður týsdagin, gevur grønlendingum eitt sindur størri kvotu av toski og hýsu í Barentshavinum, men harafturímóti minkar upsakvotan. Afturfyri sleppa norsk skip at fiska meiri tosk og kongafisk í grønlendskum sjógvi, men munandi minni av svartkalva. Sambært Sermitsiaq er grønlendska fiskivinnan nøgd við sáttmálan.



## Eitt náttúruundur

Íslendskir fiskimenn eru á einum máli um, at sildaveiðan inni á Grundarfirði á Vesturlandinum er einki minni enn eitt náttúruundur. Síðani veiðan tók seg upp inni á fjørðinum, hava skip fylt lastina ferð eftir ferð, og í gjár fór nøgdin upp um 100.000 tons, skrivar Morgunblaðið. Harafturímóti er eingin sild á hinum firðunum vestanfyri, og á Eysturlandinum er heldur eingin sild, hóast tað er tann vanliga fiskileiðin hesa tíðina á árinum.

# So kom valdagurin

**Klokkan 23:35 í gjárkvøldið boðaði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, frá á Løgtingsins røðarapalli, at val verður 19. januar 2008**



*Tað stóð nógv á samgongulimum í gjár í sambandi við bæði misálit á løgmann, og at Sambandsflokkurin ikki vildi vera við at leingja tingarbeiðið við tveimum vikum, so samgongan kundi fáa samtykt tey nógvu uppskotini, ið liggja í tinginum. Hetta verður av ongum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

POLITIKKUR

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Seks tímar við orðaskifti millum andstøðutingmenn um misálit, ið varð tikið aftur, tá Sambandsflokkurin endiliga kom við teirri útmelding, ið lá í luftini allan seinnapartin og til langt út á kvøldið í gjár. Andstøðan helt tað vera somikið ódemokratiskt at broyta freistina beint uppundir val, og setti tí misálitisuppskot á løgmann.

Orðaskiftið koyrdi meir ella minni í tómgongd, tí fyrstu nógvu tímarnar tók ongin úr samgonguni orðið. Andstøðutinglimir søgdu bart út, at teir hildu lív í orðaskiftinum av eini einastu orsøk, nevniliga at fáa Sambandsflokkin at melda út, at flokkurin ikki tók undir við at stytta valfreistina, so samgongan fekk tvær vikur afturat at fáa samtykt stóru pallettina av uppskotum, ið framvegis liggja í tinginum.

Varð um uppskotið at stytta valfreistina úr seks niður í fýra vikur samtykt, hevði samgongan fingið hetta skotbráðið, men tað gjørdist sum kunnugt ikki úrslitið.

Tað vóru teir tríggir andstøðuflokkarnir, Tjóðveldi, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum seint seinnapartin í gjár reistu misálitið. Páll á Reynatúgvu úr Tjóðveldinum, tók tó ikki undir við misálitinum.

So kom dagsins høvuðspersónur, formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, endiliga niður av loftinum og í tingsalin at boða frá einum broytingaruppskoti. Her segði hann, at flokkurin ikki tók undir við, at løgtingið skuldi fáa tvær vikur afturat at arbeiða í.

Sambandsflokkurin skjeyt tí upp, at ætlaðu broytingarnar ikki skuldu fáa gildi fyri hesa samgonguna, men ístaðin frá 1. Januar 2009. Saman við andstøðuni var undirtøka fyri uppskotinum. Tó komu hvørki misálit ella broyting í vallógini til atkvøðugreiðslu. Høgni Hoydal, andstøðuleiðari, boðaði frá, at andstøðan tók uppskotið um misálit aftur, um uppskotið hjá Sambandsflokkinum, minus Marjus Dam, ið er staddur í Danmark, hevði við sær, at freistin at útskriva val ikki varð stytt.

Tá klokkan var farin av hálvgum tólv í gjárkvøldið, boðaði løgmaður, Jóannes Eidesgaard so frá, at hann skrivaði út val at vera 19. januar.

Hetta merkir samstundis, at tey mál, sum liggja í tinginum, fella burtur.

Siðvenja er, at tingarbeiðið steðgar upp, tá val er útskrivað.

Tó skal tingið viðgera fyribils fíggjarlóg fyri 2008. Øll hini tingmálini detta burtur, og tey skulu leggjast fram av nýggjum eftir valið.

## The Dreams í danska Grand Prixnum

**Føroyski punkbólkurin syngur nú á donskum og er valdur út til danska Melodi Grand Prixið 2008**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað byrjaði við eini kapping, og nú er føroyski punkbólkurin The Dreams komin aftur á slóðina.

The Dreams gjørdi fyrstu ferð var við seg í MTV reality-røðini A Cut, men fólksliga gjøgnumbrotið fingu teir, tá ið teir spældu føroyskar klassikarar inn av nýggjum og struku upp á tónatindin við sanginum Sasasasa.

Seinastu tíðina hevur The Dreams arbeitt saman við danska framleiðaranum Chief One, og hann hevur rættiliga fingið nýtt lív í bólkinum, sum ljóðar betri enn nakrantíð áður. Dømi um hetta eru at finna á myspace-síðuni hjá The Dreams.

Og nú eru The Dreams slopnir upp í part í danska Melodi Grand Prixnum við sanginum La' mig være, sum teir hava skrivað saman við júst Chief One.

16 sangir eru valdur burtur úr stóru rúgvuni av sangum, sum á hvørjum ári vilja sleppa við til danska grand prixið.

Vinnarin av danska Grand Prixnum skal finnast í trimum umførum. Fyrst verða tvey innleiðandi umfør 12. og 19. januar, og síðani verður finalan í kappingini 2. februar.

# Kitty May kom og fór

**Nýggjasta stjørnuskotið hjá Sambandsflokkinum hevur longu tikið seg av aftur listanum**

LØGTINGSVAL

*Elin Winther Poulsen*
*elin@sosialurin.fo*

Eftir at Sambandsflokkurin í gjárkvøldið gjørdi av ikki at stuðla uppskotinum um at stytta valfreistina, so tingið fekk tvær vikur eyka at arbeiða í, hevur Kitty May Ellefsen gjørt av, at taka seg av listanum hjá Sambandsflokkinum.

- Eftir tað, sum hendi í gjárkvøldið, taki eg meg av listanum hjá flokkinum, sigur Kitty May Ellefsen, sum var eitt av nýggju, kendu nøvnunum á sambandslistanum. At freistin at skriva út val ikki varð stytt, merkir, at nógv mál detta burtur uttan viðgerð. Eitt av málunum er útbyggingin av Vága Floghavn.

-Tað er serliga málið um Vága Floghavn, sum harmar meg, sigur Kitty May.

- Floghavnin liggur í skeljasori, og vit hava bíðað eftir heimild úr løgtinginum at fara ígongd. Málið er liðugt viðgjørt í Vinnunevndini og har vantar bert onnur og triðja viðgerð.

- Tað, at Sambandsflokkurin nú bakkar út, merkir, at farast kann ikki undir Vága Floghavn, fyrrenn um nærum eitt ár, sigur Kitty May Ellefsen. Og hesum kann hon ikki liva við.

Kitty May Ellefsen, sum er nevndarformaður í P/F Vága Floghavn, hevur ongantíð áður verið limur í nøkrum politiskum flokki. Hon hevur fingið áheitanir frá fleiri flokkum um at stilla upp, og gjørdi fyri fáum døgum síðani av at stilla upp fyri Sambandsflokkin.

Sambandsflokkurin legði í gjárkvøldið fram eitt uppskot um at broyta dagfestingina, soleiðis at stytta valfrestin ikki skuldi koma í gildi fyri hesa samgonguna.



*Minni enn tveir dagar var Kitty May Ellefsen valevni hjá Sambandsflokkinum*

*Savnsmynd*

Gildiskoman verður ístaðin 1. januar 2009.